PERISKOP
FORUM FOR KUNSTHISTORISK DEBAT

Periskop: Forum for kunsthistorisk debat

Nr. 32, 2024

“Føroysk listasøga í dag”

Heiti: “Vatnlistasøgur í Norðuratlantshavi: Frida Zachariassen og fiskiskapurin í Føroyum”

Høvundur/høvundar: Isabelle Gapp

Blaðsíðutal: 66-73

Dagfesting: 31.10.2024

DOI: 10.7146/periskop.v2024i32.150460



ISABELLE GAPP

# Vatnlistasøgur í Norðuratlantshavi

## Frida Zachariassen og fiskiskapurin í Føroyum



**[1]** Frida Zachariassen: *Kvinnur stakka fisk,* c. 1950. Privat samling, Føroyar. Mynd: Listasavn Føroya.

Fiskaformar eru gjølla greinaðir í trýhyrnt mynstur á bryggjuvegnum í *Fiskagentan* (1954) **[2]** eftir Fridu Zachariassen. Teir eru spjaddir kring føturnar á kvinnum, sum kryvja og stakka fisk. Í samtíðarmálninginum, *Kvinnur stakka fisk* (á leið í 1950'unum) **[1]** verður kruvdi og saltaði toskurin stáplaður oman á hvønn annan, og saman skapa teir eina eind, eitt hvítt lognbrá. Í forgrundini í hesum málningi heldur ein kvinna, latin í ljósareytt, í stertinum á einum kruvdum toski, tað innanopnaða rúmið í búkinum verður gjørt sjónligt við einum myrkabláum stroki. Við heimaútróðri kannar verkið hjá Zachariassen sambandið millum fiskiskapin og sjófólkini, millum bátarnar í havnini og fólkið og fiskin uppi á landi. *Kvinnur stakka fisk* og *Fiskagentan* eru bæði dømi um kvinnur, sum arbeiða við tí seinna skurðinum, tá fiskurin verður haggreiddur og pakkaður. Verkini varpa ljós á kvinnurnar, sum framleiða fisk, men tey trýsta eisini til tær heilt kynsbýttu myndirnar av fiskiídnaðinum í og kring Norðuratlantshavið.

Zachariassen viðurkennir leiklutin hjá kvinnum í tí staðbundna fiskiídnaðinum, tá hon málar alternativir til tær algongdu senurnar í listasøguni við sjómonnum í oljuklæðum, sum hála teirra fong upp á dekkið umborð ella upp á land, Sum Elspeth Probyn (2014, 594) skrivar, "Um

kvinnan smeltar saman við sjógvin, hava tær søguliga havt tað fyri at verða bundnar uppi á landi." Á landi við Norðuratlantshavið vaskaðu, kruvdu, bustaðu og saltaðu kvinnur, áðrenn tær løgdu fiskin út at turka. Í Føroyum varð toskurin hongdur upp á væl gjørd stativ ella undir taksperrur at turka í sólini eins og í grannaoyggjunum Lofoten, Ísland og Norra. Líknandi siðvenjur við sólturkaðum og turrum fiski hava eyðkent heimaútróðurin í Hetlandi. Myndasøvnini í Føroyum, Danmark, Íslandi, í grannalandinum Skotlandi og Nýfundlandi handan Atlantshav hava eina rúgvu av myndum av kvinnum, sum hagreiða tosk og sild, og av fiski, sum er høgt stápladur á bryggjuni ella á gólvinum í einum virki.

Samleikin hjá nógvum støðum, serliga í Norðuratlantshavi, verður myndaður umvegis og við fiski. I eitt nú í Norra og Íslandi hava listafólk so sum Gunnar Berg (1863-1893), Anna Boberg (1864-1935), Jón Stefánsson (1881-1962) og Gunnlaugur Scheving (1904-1972) øll málað senur, sum eru sermerktar av teirra staðbundna fiskiskapi. Listasøgufrøðingurin Maura Coughlin (2020) eggjar okkum til at lesa listina umvegis fisk, tá talan er um heimaútróður og samfelag í Fraklandi í nítjandu øld. Við hesari ritroyndini skjóti eg upp, at málningarnir hjá Zachariassen ikki bara dokumentera samfelagssøguna hjá fiskiídnaðinum í Føroyum í 1950'unum, men at teir eisini samrøða við eitt størri søguligt tilknýti og leiklutin hjá kvinnum í útróðrinum kring Atlantshavið. Her strembi eg eftir eini listasøgu hjá útróðrinum í Føroyum umvegis verkini eftir Fridu Zachariassen, sum avdúka intimt knýti millum fólk, land og fisk í einum myndaformi, sum heimilar eina nærri kanning.

## Fiskiskapur í Føroyum

Í øldir hevur toskur verið grundarlagið undir "sølu tvørtur um Atlantshav sum høvuðstáttur í evropeiskum kosti og atlantiskum trælahandli" (Kurlansky 1997, 82). Uttan fyri fronsku atlantsstrondina var toskurin í 16. øld longu ovfiskaður, meðan Ísland og Nýfundland hildu á at veita hendan eftirtráðaða hvíta fiskin langt burturfrá. Fiskiskapur í Lofoten er og var ein av teimum størstu og týdningarmiklastu botnfiskastovnunum fyri polartosk hjá europeiskum fiskimonnum. Hann var serliga sterkur til byrjanina av tjúgundu øld og var vitni til broytingina frá útróðri og smáfiskiskapi til djúphavstrolaraveiðu, sum eisini fór fram í Føroyum. Í eftirkrígstíðini upplivdi føroyski fiskiskapurin brotasjógvar so sum óvissur, samanstoytir og fíggjarligan ótryggleika. Men kortini er fiskiskapurin enn høvuðsvinnan í Føroyum. Málningarnir so sum *Kvinnur stakka* fisk og *Fiskagentan* eftir Zachariassen hugsavna seg um útróðurin í Klaksvík, eru til í og svara aftur til eina serliga broytingartíð í fiskiídnaðinum og samfelagnum í Norðuratlantshavi.



**[2]** Frida Zachariassen: *Fiskagentan*, 1954. Bank Nordik, Klaksvík. Mynd: Listasavn Føroya.

Zachariassen varð fødd í 1912 í Klaksvík, og hennara fiskimálningar vóru helst merktir av hennara persónliga og geografiska tilknýti til útróðurin í Føroyum. Pápi Zachariassen, Jógvan Rasmussen ella Jógvan í Grótinum,



**[3]** Zachariassen: *Úti í Klaksvík,* 1952. Bank Nordik, Klaksvík. Mynd: Listasavn Føroya.

var bátasmiður og hevði ein týdningarmiklan leiklut í Klaksvík. Hann røktaði sambandið við íslendsku fiskimenninar og serliga teir, sum virkaðu á eysturstrondini í Seyðisfirði. Maðurin hjá Zachariassen var sjómaður, og í 1945 doyði hann í eini vanlukku á sjónum í Aberdeen, Skotlandi. Hetta var minni enn eitt ár aftaná at tey vóru blivin gift. Fyri at vita hvussu nógv hesin tilburðurin ávirkaði listaleiðina hjá Zachariassen, má mann hyggja nærri at hennara ævisøgu.

Zachariassen lærdi at tekna á einum tekniskum skúla í Danmark og slapp seinni inn á tað Kongaliga Danska Kunstakademiið, men hon takkaði nei til hendan møguleikan og fór undir eina fíggjarliga lukrativari yrkisleið í handilskapi. Hennara tekningar fevna ikki bara um senur í Føroyum, men eisini í Svøríki, Íslandi (1955 og 1976), Hetlandsoyggjunum (1956) og Norra (1958). Hesar ferðirnar vísa flytførið hjá Zachariassen sum listakvinnu, og sambondini í Norðuratlantshavi koma fram í hennara oeuvre og millum hesi landafrøðiligu økini og fólkini har. Síðst í 1940'unum og frameftir var Zachariassen verandi í Klaksvík, og tey næstu tvey áratíggjuni skapti hon tey flestu verkini. Hennara verk vórðu sýnd fram í eini soloframsýning á Listasavni Føroya í 2010, og fyri stuttum vóru *Kvinnur stakka fisk* og *Fiskagentan* við í framsýningini *Havið,* eisini vístir fram á Listasavni Føroya frá 2020 til 2021. Hóast Zachariassen hevur havt eina virkna yrkisleið, so eru hennara verk lítið umrødd uttan fyri Føroyar og hava uppiborið at vera tikin við í ein størri listasøguligan diskurs.

Listasøgufrøðingurin Malan Marnersdóttir (2012, 136) argumenterar, at tann kantuti og geometriski stílurin, sum bleiv sermerkið í verkunum hjá Zachariassen frá 1950unum og uppeftir, "ekkóar mekanikkin í tí moderna arbeiðslívinum." Marnersdóttir (2010, 119) leggur eisini dent á sambandið millum fólk og land, har tey geometrisku landsløgini hjá Zachariassen sjónliggera hjáveran av menniskjum: "Figurararnir eru vanliga málaðir til arbeiðis: teir hagreiða fisk, teir eru um at fara at rógva út, teir lossa av, keypa inn, hoyggja og geva seyðinum." Aðrir málningar eftir Zachariassen avmynda virksemi við sjóvarmálan við mastrum á skipum, sum hava lagt at bryggjuni, og rísa sum oydnir skógar móti eini bygd í bakgrun-

dini. Figurar í gulum oljuklæðum og arbeiðsbúna flyta ballur og spannir fram við brygguni, teirra eru kyn ótýðiliggjørd eins og abstrakta endurgevingin av andlitum og formum. Umframt menniskjaformin eru *Fiskagentan* og *Kvinnur stakka fisk* eftir Zachariassen eisini merkisverd á tann hátt fiskurin verður avmyndaður. Málningarnir minna okkum á, at fiskur bæði er tilfeingi og ein handilsvøra.

Umframt sjálva fiskin, avdúka málningarnir eftir Zachariassen eisini tær støðugu broytingarnar og úttømandi náttúruna í fiskiskapi og tilhoyrandi virksemi á fjøruni. Í hennara málningi *Úti í Klaksvík* (1952) **[3]** avmyndar hon damptrolarar og sluppir, sum liggja við kai, skorsteinarnir og mastrarnar blokera útsýnið út á bygdini aftanfyri. Í Føroyum hava árabátar ella útróður verið karmar um fiskiskap tætt at landi. Áttamannafør vóru vanliga nýtt at fiska tosk. Arkivmyndir úr Tjóð- og Skjalasavni Hetlands vísa fleiri føroysk fiskifør, sum liggja við kai í Lerwick. Nógvar av hesum myndunum vórðu tiknar í 1960unum og vísa tað støðuga sambandið millum fiskiskapin í Norðuratlantshavi (Wonders 2015). Meðan hildu fólk hildu áfram at rógva út í vinnuligum og privatum ørindum, tóku størri vinnulig fiskifør og trolarar plássið hjá smærri bátum í 20.øld.

Málningarnir av fiskiídnaðinum í Lofoten eftir svenska málaran Onnu Boberg viðurkenna eins og Zachariassen skiftið úr siðbundnum fiskishættum til eina vaksandi ídnaðargerð av fiskiskapinum – fyri at læna frá Marnersdóttur verður modernaða lívið mekaniserað. Líka sum í Føroyum vóru trolararnir introduseraðir í fiskiskapinum í Lofoten tíðliga í tjúgundu øld, og teir tóku plássið hjá tí lokala Nordland-bátinum. Boberg (1934, 10, endurgivin í Gapp 2021) skrivar, "Hvør hevði trúð tí í mínari tíð, tá eg vitjaði í Lofoten, /…/ at kraftin í motorinum fór at enda traditiónirnar upp á ørandi stutta tíð." Við at hava bæði útróður og damptrolarar við í *Úti í Klaksvík* tykist Zachariassen at viðmerkja sameksistensin hjá báðum fiskihættum, meðan annar spakuliga kom fram um hin og tók plássið hjá honum. At syrgja tað, at siðbundni fiskiskapurin hvarv, spælir við ta óverjandi, men gerandisligu áskoðanina, at sjógvurin hevur verið til uttan fyri søguna (Bolster 2014, 6).

At skifta frá teimum sonevndu "siðbundnu fiskiskapunum" til meira maskinbundnar hættir at selja fisk broytti strandarsamfeløgini. So stór var broytingin í tí føroyska fiskiskapinum í 1950unum, at fiskiskapurin við land, sum eyðmerkti tað staðbundna fiskisamfelagið, noyddist at flyta seg út á opið hav, og gjørdist harvið alsamt meir bundin at tilfeinginum uttan fyri landafrøðiligu mørkini hjá oyggjunum. Tað var eisini um hesa tíðina, at allar vónir um fíggjarligu optimismu í Føroyum steðgaðu brádliga. Tann landsfevnandi íløgan í eldri bretskar damptrolarar royndust vanlukkuligar, tá kolprísurin brádliga hækkaði. Sjóvinnubankin, sum lutvíst hevði stuðlað hesari royndini fíggjarliga, lýsti seg fallitt. Arbeiðsloysið hækkaði, og fleiri vóru noydd at flyta uttanlands fyri at fáa arbeiði. Fyri at lofta hesari fíggjarligu tjóðarkreppu skipaði Føroya Fiskimannafelag fyri tveimum stórum verkføllum, sum eisini fingu sjómenn at fylkjast um Tjóðveldisflokkin. Havnar Arbeiðskvinnufelag kom fiskimannaverkfallinum til hjálpar, hóast teirra verkfalsgrunnur var vorðin tømdur aftan á óteljandi stríð við arbeiðsgevarar eftir at felagið varð sett á stovn í 1936.

## Starvsfólk á bryggjuni: fiskikvinnur

*Fiskigentan* varð málað sama árið, sum tvey fiskimannaverkføll fóru fram. Kvinnurnar, sum arbeiddu í teimum leiklutunum, sum Zachariassen leggur fram, høvdu allarhelst verið uppi í sovorðnum verkfalli. Hon hevur armarnar á skák út frá sær, og føturnir hvørva í hvítum fiski, sum er lagdur út á bryggjuna. Kvinnan, sum er í miðdeplinum í *Fiskagentuni* eftir Zachariassen, hyggur beint at áskoðaranum, og tað kann lesast sum bæði ein metaforisk og ítøkilig støða.

Meðan nógv hevur verið skrivað um søguligar maskulinitetir á sjónum, hevur lítið verið hugsavnað um kvinnur á hesum vátu, fiskutu strandarøkjum (sí Downing). Í innleiðingini í fiskutum feminismum argumentera Christine Knott og Madeleine Gustavsson (2022, 1670), at "í síni kjarnu snýr fiskiskapur seg um sambandið millum men-

niskja og fisk, og feminististisk ástøði snúgva seg um at varpa ljós á ójavnvágir og at bjóða teimum av." Argumentið hjá Knott og Gustavsson hyggur at kyni í eini størri fiskiskipan. Ein partur av hesum er at viðurkenna, hvussu nógvar kvinnur tóku lut í útróðrinum og seinni flakavirkjum, eitt annað fevnir eisini um ta sosialu og politisku uppíleggingina í arbeiðararættindi, so sum Havnar arbeiðskvinnufelag vísir. Við hesum í huga kunnu málningarnir hjá Zachariassen og serliga *Fiskagentan* verða sædd í ljósinum av tí drúgva verkfallinum í fiskivinnuni tíðliga í 1950'unum.

Nýggjari kuratorisk verk rannsaka leiklutin hjá kvinnum sum vaskifólk, seymifólk, sølufólk og skómakarar í málningum í nítjandu øld, men tað er kanska ikki óvæntað, at útróðurin manglar.[1] Í 1950 tóku 4.846 kvinnur (vaksnar og ungar) út av 31.781 fólkum lut í fiskiskapinum og grindadrápi í Føroyum (Danmarks statistik 1959). Tí er verkið hjá Zachariassen serliga merkisvert – ikki bara tí tað viðurkennir tann týdningarmikla leiklutin, sum kvinnur høvdu í føroyska fiskiskapinum, men eisini tí ein kvinna hevur gjørt verkini. Listasøguliga fokusið á kvinnuarbeiðarar (listafólk) og kvinnur til arbeiðis passar til profilin hjá Zachariassen. Hesir málningarnir seta týðingarmikið spurnartekin við, hvussu nógv Zachariassen sjálv var í sambandi við tær kvinnurnar, sum hon málaði, og hvussu nógv hon tók lut í kvinnufelagnum.

Kvinnur hava leingi havt stabiliseraðandi ávirkan á arbeiðið á bryggjum í samband við útróður, tær luttóku sum døtur, systrar, konur og vinir. Tað var ikki sannlíkt at síggja hesar kvinnurnar umborð á nøkrum báti og hvaðna minni sannlíkt úti á opnum havi, ístaðin arbeiddu tær við fiski á landi ella nærindis. Kvinnur "vóru ein fantastisk migratión saman við fiskinum og átti ein týðandi lut í tí meira-enn-menniskjaligu heildini, sum var fiskur, almennur stuðul og tøkni," skrivar Probyn (2015, 594). Á fotomyndini *Fiskevasking i Vestmanhavn i Færøerne* (1898) **[4]** eftir Johannes Klein síggjast kvinnur, sum vaska fisk, við teimum somu hvítu formunum úti á bryggjuni sum í *Kvinnur stakka fisk* eftir Zachariassen. Kvinnurnar hagreiddu saltfiskin, áðrenn tær løgdu hann út at turka í sólini. Tær "passaðu fiskin, tóku hann inn hvørt kvøld, ella tá tað regnaði" (Wright 2001, n.p.). Kvinnuarbeiði



**[4]** Johannes Klein: *Fiskevaskning Vestmanhavn i Færøerne (Washing fish in Vestmanhavn, Faroe Islands),* 1898. Nationalmuseet.





**[5]** Sámal Joensen-Mikines: *Skipini fara ein várdag,* 1937. Listasavn Føroya. Mynd: Listasavn Føroya.

**[6]** Sámal Joensen-Mikines: *Skilnaður,* 1955. Listasavn Føroya. Mynd: Listasavn Føroya.

"var ein inngrógvin partur av arbeiðsuppgávum áðrenn og aftaná fong, tá tær eitt nú egnaðu línur, reingjørdu bátar, vaskaðu klæðir, kruvdu fisk ella útinnaðu fyrisitingarligt arbeiði knýtt at manning og báti" skriva Siri Gerard og Danika Kleiber (2019, 259).

Kvinnurnar í *Fiskagentan* og *Kvinnur stakka fisk* eftir Zachariasen eru rammaðar inn í bláar, hvítar, ljósareyðar og gular skuggar, og eru avmyndaðar í teirra arbeiðsumhvørvi. Við íblástri frá Marilyn Porter og hennara tekstum um Nýfundland, kom Gerrard (1983) við konseptinum um kvinnur sum "shore crew". Zachariassen sýnur kvinnur sum partur av lokalu fiskivinnuni, og ikki sum verandi avskornar frá henni.

Í mun til einsamøllu kvinnuna ytst á tromini í málninginum *Skipini fara ein várdag* (1937) **[5]** hjá føroyska málaranum Sámali Joensen-Mikines, sum hyggur at farandi sjófari og teirri ovurstóru víddini á Norðuratlantshavinum, rótfestir Zachariassen dyggiliga kvinnuliga kroppin í eitt fiskutt umhvørvi. Harafturímóti verða kvinnur bæði í áðurnevnda Mikines málningi og í verkinum *Skilnaður* (1955) **[6]** reduseraðar til eygleiðarar, ið antin bíða til fráferð ella eftir afturkomu hjá monnum.

Anders Gustavsson (1986) skrivar um rollurnar hjá kvinnum og monnum á svensku vesturstrondini, og viðmerkir eisini at tað vóru kvinnur sum í byrjanini av tjúgundu øld framleiddu oljuklæðini, ið menn nýttu í fiskiskapi undir Íslandi og nærhendis Hetland. Tey vóru upprunaliga gjørd úr gomlum segldúki við tunnum lagi av tjøru, og seinni eisini við cotton duck (eitt einkult men sterkt vovið lørift) sum bleiv lagt í línolju. Tá komið var í 1950ini bleiv hesin vatntætti fiskibúnin gjørdur úr PVC. Men í verkinum *Fiskigentan* eftir Zachariassen eru tað kvinnurnar, ið eru í oljuklæðum, meðan oljuklæddir menn eru vanligari at síggja í málningum so sum *Postbáturin* og *Grindadráp* (1970, Ribe kunsmuseum) hjá Joensen-Mikines. Málningarnir av grindadrápi eftir Zachariassen hava uppiborið nærri rannsakan, serliga tí at kvinnur søguliga ikki sluppu at luttaka í grindadrápi, men teir málningarnir liggja uttan fyri hesa ritroyndina.

Vit kunnu eisini eygleiða skiftið í kvinnumótanum; tær meira siðbundnu siluettirnar hjá bakgrundskvinnunum í *Fiskagentan* og 1950-ára stílurin í *Kvinnur stakka fisk*. Meðan kvinnurnar í seinna verkinum eru abstraheraðar til einfaldar formar, og tey týðiligu andlitstrekkini eru tikin burtur, so heldur høvuðsfigururin í *Fiskagentuni* eygnasamband við áskoðaran, har fiskurin einans virkar sum rammuskapandi í kompositiónini. Í sjálvútgivnu bókini *Brún og brá* (1979) kastar Zachariassen ljós á tey stílistisku valini, sum hon hevur lyndi til at taka: "áskoðanin at linjan skal forsterkast, stendur við enn, hóast tað ikki altíð er væl valt. Øll tóku undir hesum slagnum av abstraktión, og í 50-árunum og nakað frameftir var eg sjálv onki undantak (siterað í Marnersdóttir 2010, 13-14). Við áherðsluni á linjur og formar, tykjast bæði *Kvinnur stakka*

*fisk* og *Fiskagentan* at eftirgera prentlist við abstraktión. Við litablokkunum og teimum útgreinandi formunum og linjunum, framkallast linoleums- og træprentsteknikkir. Hesir parallellar við háttaløg í listarligum arbeiði, abstraktión í moderniseringini og prentlist í tøkniligu menningini, vísa eisini á tey ymsu støðini, har kvinnurnar í málningunum hjá Zachariassen arbeiddu - av bryggjuni til verksmiðjugólvið.

Kvinnutoymið á landi broyttist munandi eftir seinna heimsbardaga. Sum Coughlin (2020, 149) vísir á, "ídningin av fiskivinnuni, sum legði frysting aftrat eldri varðveitsluháttum so sum turking, salting ella niðursjóðing [...] ávirkaði havøkoskipanir og fiskivinnuna, ið var knýtt at havinum." Málningarnir hjá Zachariassen vísa á hesa broytingina. Eitt nú í *Kvinnur stakka fisk* byrjaðu kvinnur at verða avmarkaðar til teir ídnaðarligu bygningarnar hjá virkjunum.

## At enda

Hóast kvinnur ikki fóru tvørtur um geografisk mørk sum partur av fiskivinnuni, veita listaverkini hjá Zachariassen tvørtjóðskaparligar hættir at gjøgnumhugsa hvussu kvinnur tóku lut í fiskivinnuni í Norðuratlantshavi og aðrastaðni. Kvinnur mynda í dag um leið helvtina av starvsfólkunum í fiskivinnuni um allan heimin (Harper og onnur 2013), tað er tí vert at geva størri leiklutinum, sum kvinnur søguliga hava havt í fiskivinnuni, størri ans. Sum kvinnuligur málari, ið lýsir kvinnur til arbeiðis, gevur Zachariassen við málningunum eisini eitt serligt innlit í hesu ofta atskildu og serligu perspektiv. *Fiskagentan* og *Kvinnur stakka fisk* hjá Zachariassen veita umráðandi alternativ til tann listasøguliga dentin á arbeiði og fiskivinnu á fronsku og nýeingilsku strondunum í nítjandi øld og introdusera leiðir, sum kunnu brúkast til at kanna vatn- og sjósambond í norðuratlantiskum listasøgum.

*Føroyskað hevur Beinir Bergsson*

### VIÐMERKINGAR

1 Í seinastuni hava framsýningarnar fevnt um framsýningina hjá Cleveland Museum of Art: *Degas and the Laundress:* Kvinnur, *Women, Work, and Impressionism* (2023-24) og framsýningina hjá Philadelphia Museum of Art: *Mary Cassatt at Work* (2024).

### BÓKMENTALISTI


Boberg, Anna. 1934. *Envar sitt odes lekboll.* Stockholm: P.A. Norstedt & Söners Förlag. Isabelle Gapp týddi eftir tí, sum stóð í "An Arctic Impressionism?"

Bolster, W. Jeffrey. 2014. *The Mortal Sea: Fishing the Atlantic in the Age of Sail*. Harvard University Press.

Christensen, Annika. 2018. "Exploring Faroese and Icelandic relationships to nature in folktales. *Kópakonan* and *Selshamurinn.*" Í *Frændafundur 9*, Höskuldur Þráinsson og Hans Andrias Sølvará ritstjórnaði, 113-122. Reykjavik: Hugvísindastofnun.

Coughlin, Maura. 2020. "Shifting Baselines, or Reading Art through Fish." Í *Ecocriticism and the Anthropocene in Nineteenth-Century Art and Visual Culture*, Maura Coughlin og Amily Gephart ritstjórnaðu, 145-157. New York: Routledge. doi:10.4324/9780429059193-14

Danmarks Statistik. 1959. *Færøerne Befolkningsforholdene 1941–55* (Keypmannahavn: Bianco Lunos Bogtrykkeri), 30. https://www.dst.dk/Site/Dst/Udgivelser/GetStatMed.aspx?id=20776 (seinast vitjað 13. mars 2024)

Downing, Karen, Johnathan Thayer og Joanne Begiato. Eds. 2021. *Negotiating Masculinities and Modernity in the Maritime World, 1815-1940*. London: Palgrave Macmillan.

Gapp, Isabelle. 2021. "An Arctic Impressionism? Anna Boberg and the Lofoten Islands." Í *Mapping Impressionist Painting in Transnational Contexts*, edited by Emily C. Burns and Alice Price, 90-102. New York: Routledge. doi: 10.4324/9781003044239.

Gerrard, Siri. 1983. "Kvinner i fiskeridistrikter – fiskerinæringas bakkemannskap." Í *Kan fiskerinæringa styres?*, edited by Bjørn Hersoug, 217-241. Oslo: Novus forlag.

Gerrard, Siri and Danika Kleiber. 2019. "Women fishers in Norway: few, but significant." *Maritime Studies* 18: 259-274. doi:10.1007/s40152-019-00151-4

Gustavsson, Anders. 1986. "Women and Men in the Coastal Districts on the Swedish Westcoast: A Study of the Roles of Men and Women and of Cultural Contacts," *Ethnologia Europea* XVI, 2: 149-172.

Harper, Sarah, Dirk Zeller, Melissa Hauzer, Daniel Pauly og Ussif Rashid Sumaila. 2013. “Women and fisheries: Contribution to food security and local economies.” *Marine Policy* 39: 56-63. doi:10.1016/j.marpol.2012.10.018

Knott, Christine og Madeleine Gustavsson. 2022. “Introduction to fishy feminisms: feminist analysis of fishery places.” *Gender, Place & Culture: A Journal of Feminist Geography* 29, no.12: 1669-1676. doi:10.1080/0966369X.2022.2135492

Kurlansky, Mark. 1997. *Cod: A Biography of the Fish That Changed the World.* New York: Penguin.

Marnersdóttir, Malan. 2010. *Frida Zachariassen*. Tórshavn: Listasavn Føroya.

Nadel-Klein, Jane. 2003. *Fishing for Heritage: Modernity and Loss Along the Scottish Coast.* Routledge.

O’Neill, Mary. 2021. “’A Splendid Body of Men’: Fishermen as Model Males in Late-Nineteenth-Century British Imagery.” Í *Negotiating Masculinities and Modernity in the Maritime World, 1815-1940,* Karen Downing, Johnathan Thayer og Joanne Begiato ritstjórnaðu, 77-98. London: Palgrave Macmillan. doi:10.1007/978-3-030-77946-7_4

Porter, Marilyn. 1985. “’She Was Skipper of the Shore-Crew:’ Notes on the History of the Sexual Division of Labour in Newfoundland,” *Labour/Le Travail* 15, no. 105: 105-123. doi:10.2307/25140555

Probyn, Elspeth. 2014. “Women following fish in a more-than-human world.” *Gender, Place & Culture: A Journal of Feminist Geography* 21, no.5: 589-603. doi:10.1080/0966369X.2013.810597

Willson, Margaret. 2016. *Seawomen of Iceland: Survival on the Edge*. University of Washington Press.

Wonders, William C. 2015. “Northern Ties: Shetland and Scandinavia over the Years.” *Northern Scotland* 15, no.1: 95-121. doi:10.3366/nor.1995.0007

Wright, Miriam. 2001. “Women in the Inshore Fishery.” Heritage: Newfoundland and Labrador. https://www.heritage.nf.ca/articles/economy/women-fishery.php (seinast vitjað 13. mars 2024)